Tunnilsbólkur við:

Jón Sigurdsson, Kristian Stórhamar og Mourits Joensen

Løgmansskrivstovan

Samband: lms@lms.fo

Tórshavn 14. november 2025

Hoyringsskriv:

Mál: Uppskot til løgtingslóg um Suðuroyartunnilin við tilhoyrandi tunnilskervum og vegakervum

Uppskotið gevur P/F Suðuroyartunnil heimild til at fyrireika, prosjektera og bjóða út verkætlanina Suðuroyartunnilin við tilhoyrandi tunnilskervum og vegakervum.

Viðmerkingar:

Uppskotið varð tikið aftur í mai mánaða og síðan sent til hoyring 31. oktober. Hoyringsfreistin er 14 dagar. Vit átala stuttu hoyringsfreistina, sum als ikki gevur nóg nógva tíð til at seta seg nøktandi inn í tilfari, meta um avleiðingar og árin og geva eitt sakligt hoyringsskriv. Stutta hoyringsfreistin er eisini í stríð við rundskriv um lógarsmíð.

Munandi broytingar eru gjørdar í í lógaruppskotinum. Vegaføringin í Sandoynni er broytt, flutt av Traðarhamri og oman í Sands bygd og tískil er tað eitt munandi broytt uppskot, og tí eigur hoyringsfreistin at verða hildin, sambært rundskrivinum.

Eitt so stórt mál eigur ikki at verða skunda í gjøgnum uttan møguleika fyri eini sakligari viðgerð, har allir møguleikar, vandar og váðar verða lýstir, vendir og viðgjørdir.

Linjuføringin eigur ikki at verða løgd føst áðrenn úrslitini av endaligum jarðfrøði kanningum fyriliggja og eru viðgjørd á fult góðan hátt.

Linjuføringin eigur ikki at verða løgd føst áðrenn árin á náttúru, umhvørvi og bygdarlív eru kannaði, lýst og viðgjørd á nøktandi og fullgóðan hátt.

Fíggingarleisturin fyri verkætlanina við ítøkiligum møguleikum eru ikki nóg væl lýstir, har fíggjarligu avleiðingarnar fyri samfelagið, borgaran, brúkaran og vinnulív eisini eru væl lýstar.

Váðar og vandar við nevndu viðurskiftum enn ikki lýst, viðgjørd og mett um.

Í hoyringartíðarskeiðnum er komið fram, at tíðandi økir fyri fuglalív eru í Sandoynni, sonevnd IBA-økir. Hesi verða als ikki umrøtt í tilfarinum, sum er sent til hoyringar. Harumframt kunnu friðingar og fornminni, á Sondum og har um vegir, sum als ikki er umrøtt í tilfarinum og tískil ikki viðgjørd, seinka ella í ringasta føri steðga ætlanini.

Tað er ikki nóg væl nágreina í uppskotinum hvat verður gjørt við grót og tunnilstilfar, sum kemur úr tunlinum og avleiðingar av hesum fyri umhvørvinum.

Vit vilja eisini vísa á at uppskotið hjá okkum er broytt og bert lutvíst viðgjørt, til dømis er arbeiðsøki og havn í Skúvoy er als ikki samsvar við uppskotið hjá okkum og heldur ikki óhefta tunnilsbólkinum hjá Løgmannskrivstovuni.

Vit mæla til góða og gjølliga fyrireiking og síðan skjóta og effektiva útinnan av verkætlanini. Hesi vóru eisini ráðini frá serfrøðinginum í verkætlanum Bent Flyvbjerg. Hetta eigur eisini at síggjast aftur í lógaruppskotinum sum er lagt fram.

Vit vilja átala at vit verða lagdir undir ikki at vilja samstarva, vit vilja enn sum áður fegnir hjálpa Landsstýrinum at finnað røttu og bestu farleiðina grunda á omanfyri nevndu atlit.

Vinarliga heilsan

Jón Sigurdsson	Kristian Stórhamar	Mourits Joensen
Verkfrøðingar	Tunnilserfrøðingur	Búskaparfrøðingur